Tíðindaskriv frá Sandoy Seafood í Skopun

# Hvat gerst á bygd?

**– Framløgur og orðaskifti um økismenning í Sandoynni**

Mánadagin 15. januar skipar Vinnulívsráðið í Sandoynni fyri fundi um økismenning. Økismenning tykist vera vorðið eitt nýtt gandaorð í politiska orðaskiftinum, men spurningurin er, hvat er hent á økinum, hvør støðan er og hvat kann gerast. Dennis Holm og Ólavur Waag Høgnesen, samfelagsfrøðingar á Granskingardeplinum fyri Økismenning, fara at leggja upp til orðaskifti á fundinum.

**Dennis Holm:** Í 1950 búðu 1652 fólk í økinum (Skúvoy íroknað), og árini 1978-1990 búðu stabilt 1750 fólk í Sandoyar-økinum (1983-84 tó um 1800). Hinvegin, líta vit at, hvussu stórur partur av øllum føroyingum búgva í Sandoyar-økinum, so hevur støðugt verið talan um eina lutfalsliga afturgongd. Í 1950 búðu 5,2% av Føroya fólki í Sandoyar-økinum, men longu fyrst í sekstiárunum byrjar afturgongdin: Frá 1960 (5%) minkar talið javnt ár um ár, og heldur ikki tey nógv umrøddu áttatiárini megnaðu at steðga gongdini. Kreppuárini minkaði fólkatalið við umleið 300; í dag búgva uml. 1460 fólk í økinum, og tað svarar til 3,2% av øllum teimum, sum búgva í Føroyum.

Sostatt er gingið aftur á hondina í Sandoyarøkinum, bæði í góðum og ringum tíðum. Síðani flakavirkini lótu uppaftur – m.a. stuðlað av teirri sokallaðu Sandoyar-verkætlanini – er virksemið og harvið bæði lønar- og skattainntøkurnar vaksnar, men fólkatalið er bert kvinkað uppeftir. Spurningurin er tí, um hettar er ein lagnugongd, ið ikki slepst undan. Ella eru grundir fyri at halda, at ein eginmenning í økinum er møgulig? Tann, sum umhugsar, at flyta í Sandoynna, spyr sjálvsagt, hvat oyggin hevur at bjóða sum er, og hvørji útlitini eru fyri eini menning í framtíðini, ið ger økið lokkandi fyri nútíðarfamiljuna? Er Sandoyggin eitt lokkandi alternativ til onnur øki í landinum ella...?

**Ólavur Waag Høgnesen.** Gongdin síðani kreppuna hevur greitt havt við sær eina miðsavning, bæði tá ið um fólkatal og ressursir annars ræður (flutningstænastur, almennar tænastur o.s.frv.). Saman um tikið hevur tað við sær, at vinnulívsfyritøkur á meginøkinum hava betri fortreytir at virka undir enn tær, ið hava sund og fjørð millum seg og ressursirnar á meginøkinum. Útjaðarafyritøkurnar dragast sostatt ikki bara við teir praktisku (og harvið kostnaðarligu) vansar, sum miðsavningin hevur við sær; miðsavningin ávirkar eisini møguleikarnar hjá útjaðarafyritøkunum at útvega fígging. Dømini verða alt fleiri um, at stóru fíggingarstovnarnir ikki vilja fíggja útjaðarafyritøkur; hetta hendir við tilvísing til, at fastognarvirðini á bygd eru lág og váðin tí ov stórur. Ein avleiðing hevur verið, at smáu fíggingarstovnarnir hava átikið sær vinnulívsfígging við størri váða, men lokalir fíggingarstovnar eru sum kunnugt ikki í Sandoynni. Hettar reisir spurningin, um tað hevði verið rætt við átøkum, ið kunnu veita vinnulívinum í útjaðaranum fígging. Greitt verður frá teimum skipanum, sum eru galdandi á hesum økinum í eitt nú Íslandi og Noregi, og lagt verður upp til orðaskifti um, hvussu ein serlig útjaðarafígging kann skipast her á landi.

Framløgurnar verða mánakvøldið 15. januar kl. 19.30.

**VIÐMERKING**

# Neyðugt , at landsins hægstu myndugleikar taka landsdjóralæknan av ræði!

**Óla Jákup úr Dímun**
*bóndi, St. Dímun*



Ein lítil fittur nósi, ið var vilstur frá móður síni og komin á land á Tinganesi, varð avlívaður eftir boðum frá Bjørn Harlou, landsdjóralækna.

Sami vil hava henda kópaungan kannaðan, hvørt hann er berari av einihvørjari umfarsótt, samstundis sum hann higartil partvíst hevur loyvt, og eftir 1. februar 2001 argumenterar fyri at loyva ótarnaðum innflutningi av higartil ikki staðfestum djórasjúkum til Føroyar.

Spyrji meg sjálvan: Skemt av vánaligasta slag, ella hvat?

**Landbúnaðurin og fólk við alski til føroyska djóralívið ongan »Góðan« við samráðingarborðið**

Fólk, ið sótu við samráðingarborðið til samráðingarnar við ES um handilsavtaluna hava sagt, at tey ikki vistu, at ES-fólkini fóru at taka upp spurningin um landbúnaðin, men at avtala bert skuldi gerast um fisk. Nú um dagarnar verður nógv gjørt burtur úr frá somu fólkum at upplýsa, at fiskur/fiskivinna og landbúnaður í ES hoyra óloysiliga saman. Átti ikki okkara samráðingarnevnd at vitað hetta frammanundan?

Landbúnaðurin hevði biðið um at vera við til samráðingar.

**Átti ikki landsdjóralæknin at havt umboða áhugamál hjá føroyska landbúnaðinum?**

Landsdjóralæknin sigur í bløðunum, at hann ongar trupulleikar hevur við at seta úr gildi bann ímóti fríum innflutningi av livandi djórum, vísandi til WTO-samtyktir.

Landsdjóralæknin veit helst, at Ísland hevur í avtalu við ES alskyns fyrivarni á hesum øki .

Lond sum Noreg, Svøríki og Finnland hava fingið loyvi frá ES at seta bann ímóti, at djór og djóraúrdráttir verða innflutt úr øðrum londum. Hetta fyri at verja seg móti sjúkum.

Í Føroyum hava vit í eina øld havt vælvirkandi djóralæknatænastu, sum við sera restriktivum politikki viðvíkjandi innflutningi av livandi djórum, hevur vart føroyska djóralívið fyri hættisligar og annars óhepnar djórasjúkur.

Soleiðis sum eg skilji landsdjóralæknan, so hava vit í Føroyum sjúkurnar, so leingi tað ikki er prógvað, at tær ikki finnast. Meira sannlíkt er, at so leingi tær ikki eru ávístar, finnast tær ikki.

Tá eg so veit, at embætisfólkini frá ES við samráðingarborðið beinleiðis spurdu føroysku samráðingarnevndina, um tey høvdu nakrar trupulleikar við at góðtaka henda partin av avtaluni og landsdjóralæknin sigur seg ongar hava, fari eg persónliga at ivast í um viljan at tæna áhugamálum hjá føroyska landbúnaðinum. Við øðrum orðum: Hvar er loyaliteturin?

Ráðini til vinnuna, um sjálva at syrgja fyri eftirliti og fyribyrging, fati eg mest sum eina niðurgering av vinnuni. Skulu hesi ráðini frá Bjørn Harlou kunna brúkast innan hesa vinnuna, so kundi hann eins væl mælt til at avtikið alt fiskiveiðieftirlit og reguleringar annars viðvíkjandi fiskivinnuni. Fiskivinnan kundi bert sjálv syrgt fyri hesum.

**Avtalan við ES ikki henda prísin verd**

M.o. løgmaður sigur, at avtalan er alneyðug og at einki var at gera. Landbúnaðurin mátti ofrast.

Hvørgin av hesum útsøgnum eru eftir mínum tykki rættar.

Sjálvandi skilir ein og hvør, at fiskaútflytarar fáa nakrar fyrimunir, við at eftirlitið er avtikið. Men mín greiða fatan er, at føroyska samráðingarnevndin er farin til samráðingarborðið, partvíst óvitandi um, hvat samráðingarnar skuldu snúgva seg um og annars við teirri fatan, at ES ikki hevur brúk fyri eini avtalu við Føroyar, men at bert vit hava brúk fyri ES. So at siga við hattinum í hondini. Sostatt er prísurin fyri hesa avtalu alt ov høgur. ES hevur brúk fyri fiskinum úr Føroyum. Vit útfyta fisk við verandi avtalu til ES fyri methøgar prísir og prísurin av rávøruni er tilsvarandi methøgur.

Tað eru og verða marknaðarkreftirnar/eftirspurningurin, ið til eina og hvørja tíð stýra samhandlinum við ES.

**Viðvíkjandi avtaluni í sambandi við lanbúnaðin:**

Tann parturin, ið umfatar frían innflutning av livandi djórum, hevur ongan fíggjarligan týdning fyri ES (ikki fyrr enn vit hava innflutt sjúkur, so øll húsdjór, neyt og seyður, eru týnd). Tað er ógvuliga sannlíkt, at tá onnur lond við ymiskum tilknýti til ES í samráðingum við ES, við atliti til sjúkuvandar, hava alskyns fyrivarni, kundu vit eisini havt fingið slík, um bert vilji var til staðar at samrást um hetta.

Av gáloysni hava vit komið føroyska neytaslagnum og føroysku rossunum í stóran vanda fyri at doyggja út. Hægsti veterineri myndugleiki í Føroyum stuðlar uppundir fríum innflutningi av livandi djórum. Er veruliga so illa statt, at hesin myndugleiki onga ábyrgd kennir fyri at verja eitt nú føroyska seyðin, sum í øldir hevur klætt og føtt føroyingin. Hevur verið ein partur av føroysku náttúruni og lært at yvirliva og balast í hesi sermerktu náttúruni?

Ómetaligi vandin fyri, at hetta lívið kann verða týnt og vandamál annars, sum eingin kann meta um fyri føroyskan landbúna gera, at alneyðugt er at ætlaða avtalan ikki kemur í gildi sum ætlað 1. februar 2001.

Landsins politisku myndugleikar mugu taka upp samband við ES um henda spurningin. Neyðugt er at seta fólk við fullum loyaliteti og ábyrgdarkenslu fyri føroyskum landbúna og húsdjórum at samráðast við ES á hesum øki.

Avtalan við ES má ikki koma í gildi, fyrr enn hetta er fingið uppá pláss.



# ítróttir

Nr. 9 • leygardagur • 13. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Trupult hjá Stjørnuni

**Meðan nýggi kyndilsvenjarin skal royna seg, skal Stjørnan til Vágs har sera torførur útidystur stendur á skránni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast endaliga støðan nú er farin at hómast alt betri, so eru enn nakrir dystir at avgreiða, áðrenn kvinnuhondbólturin kann fara undir grundspælið í fremstu deildini.

**Ikki ráð at tapa**

Ein av spurningunum tykist vera, hvørt tað fer at eydnast Stjørnuni at halda fast um VÍF, sum tó uttan iva fer í endaspælið við minst einum stigi fleiri enn føroyameistararnir.

Talan kann gerast um fleiri stig, fær Stjørnan ikki fulla úrtøku burtur úr dystinum í Vági, og tað er nógv, sum bendir á, at talan verður um ein sera torføran dyst hjá klaksvíksgentunum. VB hevur eftir vetrarsteðgin fingið Christinu Holm aftur á liðið, og tað kundi væl verið, at hetta er júst tað, sum kann geva VB seinasta skumpið uppeftir. Higartil hava tær verið eitt lítið vet veikari enn Stjørnan og VÍF, men við styrkinum á strikuni hava tær kanska bøtt um seinasta partin av liðnum. Hinvegin er Stjørnan eisini styrkt, tí sunnudagin fær toppskjúttin í 1. deild, Simona Dziugyte, helst sín elddóp fyri nýggja lið sítt, og kanska verður tað avgerandi fyri dystin, hvussu væl hon fellur inn á nýggja liði sínum.

**Lokaluppgerð á Hálsi**

Meðan sambiðlurnar úr Klaksvík fara til Vágs at spæla torføran dyst, tykist hjá VÍF hinvegin at vera ein reinur avgreiðsluspurningur. Higartil hevur Tjaldur í øllum førum ikki kunna hótt ovaru liðini, og hóast tær nú verða styrktar við enn einum útlendskum leikara, so er hetta neyvan nóg mikið til at gera nakað við VÍF.

Seinasti dysturin í kvinnudeildini hetta vikuskiftið verður á Hálsi, har havnarliðini bæði tørna saman. Mest av øllum tykist hetta at vera ein dystur um, hvør skal eiga fjórða plássið í deildini, nú grundspælið nærkast endanum. Í løtuni er Kyndil framman fyri í hesum, men kyndilsliðið er nógv skert undan uppgávuni, har fleiri av vanliga føstu leikarunum ikki fáa verið við. Umframt at vera lokaluppgerð, er hetta eisini fyrsti dysturin hjá Lotte Sørensen við róðri hjá kyndilskvinnunum, og so er spurningurin, um hetta kann fáa leikararnar at geva nakað eyka, fyri at uppviga missin at burturstøddu leikarunum.

Dystirnir sunnudagin eru hesir:

| dystir | dómarar |
|---|---|
| VB–Stjørnan | h71 |
| VÍF–Tjaldur | kyndil |
| Neistin–Kyndil | tjaldur |

**Støðan 1. deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 10 - 1 - 0 | 334 | 181 | 153 | 21 |
| 2 | Stjørnan | 11 | 9 - 1 - 1 | 309 | 234 | 75 | 19 |
| 3 | VB | 10 | 7 - 0 - 3 | 274 | 202 | 72 | 14 |
| 4 | Kyndil | 11 | 5 - 0 - 6 | 253 | 293 | -40 | 10 |
| 5 | Neistin | 11 | 4 - 0 - 7 | 226 | 252 | -26 | 8 |
| 6 | Sóljan | 12 | 1 - 1 - 10 | 218 | 319 | -101 | 3 |
| 7 | Tjaldur | 10 | 0 - 1 - 9 | 158 | 291 | -133 | 1 |

**Máltindurin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Sóljan | 103 | (23) |
| Ioana Rapa | VÍF | 82 | (19) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 82 | (22) |
| Annika Thomsen | Neistin | 72 | (10) |
| Sóleyð Mikkelsen | VÍF | 71 | (26) |
| Regina Radó | VB | 68 | (22) |
| Fríða Marjunardóttir | VÍF | 57 | (8) |
| Nicolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 55 | |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 53 | (7) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 51 | |
| Gurið Mortensen | VB | 50 | (4) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 47 | (5) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 46 | (22) |
| Andrea Lütz | VB | 44 | |
| Beinta Joensen | Tjaldur | 43 | (9) |

# Heimsmeistarin kláraði fyrstu royndina

**Talv: Vladimir Kramnik sum í november bleiv heimsmeistari, vann ein kviktalvsdyst í ímóti fimtfremsta telvaranum í heiminum Peter Leko. Nýggjur altjóða ratinglisti er útkomin, har til dømis John Arni Nilssen nú hevur heili 2371 í rating.**

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Kviktalv sigur sjálvsagt ikki eins nógv um talvstyrki eins og vanligt nærtalv ger, men tá nú maðurin eitur Kramnik og er júst vorðin heimsmeistari liggur øgiligt trýst á viðkomandi. Kramnik og Leko telvaðu fyrra partin av január tólv kviktalv, 25 min. hvør, og úrslitið bleiv 7-5 til Kramnik.

Dysturin varð sera áhugaverdur, og vælleiktur. Áhugavert var at Leko vann við einum frábrigdi í sponsku byrjanini sum Kasparov ikki megnaði ímóti Kramnik.

Russiska bjørnin legði seg trygt á odda 3-1, men Leko útjavnaði í flottum stíli til 4-4 undan teimum seinastu fýra talvunum. Men tá vísti heimsmeistarin seg frá sínari bestu síðu og vann dystin at enda 7-5.

Ein góð upphiting hjá báðum pørtum undan krútsterku kappingini í Hollandi, Wijk aan Zee, har øll elitan er samlað. Kappingin byrjar í dag, og heldur fram til 28. januar. Hetta verður fyrsta kapping í fimtan ár har Kasparov ikki kann kalla seg heimsmeistara, men tó verður hann mettur favorittur.

Fylgjast kann við á http://www.corusgroup.com/coruschess/home.html, har eisini øll talvini verða víst beinleiðis á telduskíggjanum.

**Elo listin**

Kasparov hevur enn 2849 í rating og liggur sostatt nógv fremstur í toppinum. Tann næsti er W. Anand sum hevur 2790, sum er ein framgongd vegna Fide HM hansara. Tann triði er Kramnik við 2772.

Fide hevur ikki tikið privata HM-dystin ímillum Kasparov og Kramnik við í nýggja listan. Hendan avgerð hevur framt øsing millum telvarar, sum siga at listin tískil als ikki er eftirfarandi. Kasparov hevði tó havt hægsta ratingtal í heiminum um dysturin hevði verið tikin við í útrokingini.

Tað eru serliga tveir telvarar í føroyska talvheiminum sum skara framúr, og tað eru John Arni Nilssen og John Rødgaard. Teir hava nú ávíkavist 2371 og 2365, meðan Heini Olsen er tann triði í røðini við sínum 2302. Síðani er eitt lop niður til Flóvin Tór Næs, 2236. Sigast skal at Jens Kristian Hansen hevur 2240, men hevur ikki telvað serliga aktivt seinastu árini. John Arni hevði eitt gott OL, eins og John Rødgaard og tað er høvuðsorsøkin til teirra framgongd.

Ein sum veruliga hevur framt skarvslop er Martin Poulsen. Heili 2170 hevur hann og nærkast nú Ólavi Simonsen, Eyðun Nolsøe og Torbjørn Thomsen, sum liggja beint omanfyri.

Keðiligt er at ungi Olaf Berg enn ikki hevur fingið sítt altjóða ratingtal. Hann hevur langt síðani skula ogna sær tað, men Fide hevur nógvar trupulleikar innanhýsis, og eitt nú ganga hesir útyvir ratinglistan.

**Toppur og botnur**

Fimta umfar í liðkappingina verður í morgin; Kollafjørður — Havnin, Klaksvík — Vestmanna og Sandavági — Hvalvík hittast í fyrstu deild. Serliga dysturin í Kollafirði er áhugaverdur. Kollfirðingar liggja á odda saman við klaksvíkingum, meðan havnarmenn hinvegin deila aftasta pláss saman við teimum úr Sandavági.

Vestmenningar muga eisini koma í gongd, tað nyttar ikki bert at Torbjørn vinnur síni talv, serliga mugu aftastu borðini hála stig inn um vón skal gerast um fremru plássini.

Teir í Talvfelagnum Føroyar í skulu eisini telva týðandi dyst um vikuskifti. Teir liggja á odda í triðju deild í donsku liðkappingini, men bert eitt stig er á muni til næsta lið, og tískil er hvør dystur umráðandi. Teir møta Saxo sum liggja nógv aftastir í røðini, og tískil liggur stórsigur helst í skjáttuni.

**Talvið hesa vikuna**

John Arni telvar í Norra í løtuni, men sera torført hevur verið at fáa upplýsingar frá kappingini, sum er ein opin kapping í Gausdal. Úrslitini eru tíverri ikki dagført á heimasíðuni, men vit hava frætt at eftir fimm umførum hevði John Arni hálvtfjórða stig. Talvið hesa vikuna er úr fimta umfari.

Carlsen,M (2000) -
Nilssen,J (2371)
Gausdal Troll Masters (5)

1.e4 c5 2.Rif3 Ric6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 e5 Kalaschnikov frábrigdi í sisilionskum, sum John Arni nærum altíð leikar 5.Rib5 d6 6.Ri1c3 a6 7.Ria3 b5 8.Rid5 Rige7 9.c4 Rid4!? Áhugavert finnuoffur, sum gevur gott spæl 10.cxb5 Rixd5 11.exd5 Bd7 12.Be3 axb5 13.Bxd4 exd4 14.Fxd4 Be7 15.Rixb5 John Arni hevur nú tvær finnur minni, men hvítur má telva heilt feilfrítt um hann skal yvirliva 0-0 16.Ric3 Bf6 17.Fd2 Re8+ 18.Be2?? Kd1 hevði allarhelst bjargað hvítum Bxc3 19.Fxc3 Bb5 20.0-0 Rxe2 21.Rfe1 Rxe1+ 22.Fxe1 Bc4 0-1